# TWR – KVINNUR VIÐ VÓN

***BØNARÁHEITANIR FYRI APRÍL 2024 – NORÐUR- OG SUÐURAMERIKA***

1. Faðir, hjálp eldru kvinnunum í Domingolýðveldinum at stuðla yngru kvinnunum og vegleiða tær , hvussu tær kunnu liva eitt lív í vísdómi og áliti á Gud. (Titus 2:4-5)
2. Gud, vit biðja, at Tú vilt síggja til, styrkja og endurnýggja mammur í Brasil, ið hava børn, ið bera brek, og menn teirra eru rýmdir frá teimum. ( 5. Mósebók 31:6)
3. Gud, grøð kvinnur í Paraguai, ið hava krabbamein, men fáa ikki dygga læknaviðgerð orsakað av vantandi tilfeingi í heilsuverkinum í landinum. (Jeremias 17:14)
4. Harri, vit takka Tær fyri jaligu aftursvarini frá teimum, ið lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingum, ið verða varpaðar út tvær ferðir um vikuna í Uruguai, og hvønn dag á alnetinum og sosialum miðlum. (Sálmur 105:1-2)
5. Faðir, vit biðja, at Tú vilt verja og grøða**,** kvinnur og menn í Bonaire, ið eru úti fyri harðskapi innanhýsis**,** og at tey finna eitt trygt stað. (Sálmur 9:10-11; ensk: 9: 9-10)
6. Harri, tak burtur óttan, ið nívir kvinnur í USA. Lat tær líta á Teg og læra at hvíla í Tær, at Tú vilt verja og hjálpa. (Sálmur 34: 9-11; ensk: 34:8-10)
7. Gud, lat fólk, ið fáa lurtitól, sum innihalda *Kvinnur við Vón* sendingar, og sum eru send úr Kanada og kunnu hoyrast um allan heim, koma at kenna Teg og verða umbroytt av Tær. (2. Korintbræv 5:17)
8. Harri, gev kvinnum í Domingolýðveldinum, ið saman við manni sínum ella sambúgva fostra upp tannáringar, vísdóm og áræði og læra tey Guds Orð. (5.Mósebók 11:19)
9. Vit prísa Tær, Harri, fyri øll í TWR *Kvinnur við Vón* toyminum í Brasil, og fyri tey sjálvbodnu, fyri teirra hjálpsemi, eldhuga og kærleika til Tín og trúartænastuna. (Filemon 1:4)
10. Faðir, styrk og grøð hjørtuni hjá mammum í Paraguai, ið líða undir, at børn teirra eru tengd at rúsevnum ella sita í fongsli. Hjálp børnunum at finna frælsi í Tær. (Galatiabrævið 5:1)
11. Harri, hjálp veljarum við valið í Uruguai í 2024 at velja og útnevna ærligar og rættskafnar leiðarar, ið hava samhuga og vælvilja at bøta um tørvin hjá fólkinum. (Rómbrævið 13:3-4)
12. Harri, vit biðja fyri teimum, ið lurta eftir *Kvinnur við Vón* sendingum úr Bonaire**,** at tey vilja taka ímóti Kristusi sum sínum Frelsara og kunna gleðast í Tær. (Sálmur 73:28)
13. Faðir, tú ert ein Gud, ið tekur Tær av parløgum. Hjálp ungum kvinnum í USA at ynskja og læra at hava innihaldsríkt og lívgevandi parlag, ið líkar Tær. (1.Korintbræv 13:4-7)

14. Takk, Gud fyri nýggju hættirnar, ið TWR Kanada samstarvar við TWR *Kvinnur við Vón* í 2024 at bera vónina um Jesus til kvinnur runt allan heim. (1.Korintbræv 3:9)
15. Faðir, hjálp kvinnum í Domingolýðveldinum at vera førar fyri at megna arbeiðsuppgávurnar væl til frama fyri familjuna og hjúnalagið. (Sálmur 90:17)
16. Miskunnsami Gud, bjarga brasilianskum gentum og kvinnum, ið eru offur fyri kynsligum menniskjahandli. Grøð tær og gev teimum eitt nýtt lív. (Jeremias 33:6)
17. Himmalski Faðir, lat kvinnur í Paraguai fáa javnlíka atgongd til útbúgving, og tak burtur forðingar fyri akademiskari og fakligari menning. (Galatiabr. 3:28)
18. Harri, lat kvinnur í Uruguai finna frið í Jesusi og fata, hvussu høgan prís, Tú hevur goldið fyri tær. Fría tær úr rúsevnismisnýtslu og frá teimum, ið vilja gera teimum ilt. (Jóhannes ev. 14:27)
19. Harri, vit biðja Teg um at styrkja hjúnabondini í Bonaire og varða tey frá oyðileggjandi ætlanum hins ónda. Gev hesum hjúnum náði og vegleiðing. (1.Korintbræv 16:14)
20. Ævigi Faðir, vilt Tú hjálpa kvinnum í Domingolýðveldinum at líta á, at Tú vilt hjálpa teimum at útinna leiklut teirra sum gudsóttandi konur. (Orðtøkini 3:5-6)
21. Gud, vilt Tú útvega fátækum kvinnum í Brasil, og teimum, ið búgva í økjum við skerdari heilsutænastu, at fáa atgongd til góða heilsurøkt og heilsukanningar. (Sálmur 140:13; ensk: 140:12)
22. Faðir, útvega kvinnum í Paraguai, ið uppliva innanhýsis harðskap ella harðskap vegna kyn, vernd og tryggleika. Hjálp teimum at finna skjól og stuðul at basa hesum trupulleikum. (Sálmur 10: 17-18)
23. Harri, Tú segði: "Latið smábørnini koma til Mín." Í Uruguai eru 21% av børnunum fødd í fátækdømi. Vit í Uruguai biðja um miskunn Tína yvir børn okkara; lat tey koma at kenna kærleika Tín. (Matteus 19:14)
24. Gud, vit biðja, at gentur í Bonaire koma at kenna sanna virði sítt í Tær, og ikki søkja óhóskandi felagsskap fyri at finna troyst og tryggleika. (Orðtøkini 13:20)
25. Harri, lat kvinnur í Domingolýðveldinum geva hjørtu síni til Tín og verða frelstar. Gev teimum styrki at vera trúfastar. (Ápostlasøgan 4:12)
26. Faðir, hjálp brasilianskum kvinnum, ið uppliva misnýtslu ella innanhýsis harðskap, at bróta seg leysar úr hesum sambondum við misnýtslu og finna tryggleika og verju í Tær. (Sálmur 9:10; ensk: 9:9)
27. Faðir, lat einligar mammur í Paraguai, ið eru einsamallar um at ala børn síni upp og útvega alt til familjuna, finna stuðul og tað, teimum tørvar til lívsins uppihald. (Matteus 6:31-32)
28. Harri, vit biðja Teg um, at teir mongu túsund tilflytarar, ið koma til Uruguai at leita eftir framburði, men enda í skøkjulevnaði, kunnu finna arbeiði. Miskunna hesum kvinnum og gentum. (Filippibrævið 4:19)
29. Gud, í Bonaire er stórur mismunur, og vit biðja, at har skal verða sínámillum virðing, so at fólkini kunnu samstarva landinum at frama. (Filippibr. 2: 4-5)

30. Harri, grøð kvinnur í Domingolýðveldinum, ið verða misnýttar. Gev teimum dirvi at søkja ta hjálp teimum tørvar at sigra á hesum og koma víðari í lívinum. (Sálmur 147:3)

**”Latið okkum tí við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar, so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp á rættari tíð!” (Hebrearabrævið 4:16)**

# *Ein Trygg Vón*

Eftir Yicell Ortiz, Women of Hope økissamskipara fyri Latínamerika, Vesturindisku oyggjar og sponsku trúartænastuna í USA

Latínamerika og Vesturindisku oyggjarnar eiga ein ríkan, mentanarligan og andaligan arv. Tó, í hesum økjum, eins og í øðrum, er lívið hjá mongum kvinnum tvinnað saman við líðing og vónloysi á nógvum økjum. Sum tú kanst ímynda tær, leingist hvør einstøk kvinna eftir friði, tryggleika og vón.

Av tí, at vit eru likam Kristusar, mugu vit hugsa um umstøðurnar hjá hesum mongu kvinnum, og vísa teimum, at tað av sonnum er møguligt at hava frið, tryggleika, og vón gjøgnum Frelsara okkara, ið heimurin ikki kann veita. Tað er týdningarmikið at vita, at vón okkara liggur ikki í tí, vit kunnu gera ella uppnáa. Orð Guds sigur okkum, at vón okkara er í Kristi Jesusi, ið gevur øllum týdning. Vit taka undir við sálmaskaldinum, Dávidi, ið sigur: “Hvørjum bíði eg tá eftir, Harri? Øll vón mín stendur til Tín!” (Sálmur 39:8)

TWR *Kvinnur við Vón* í Latínamerika og Vesturindisku oyggjunum veita kvinnum hjálp at styrkja trúgv teirra gjøgnum bólkavenjing, útvarpssendingar og, fram um alt, bøn. Trúartænastan er ymisk frá landi til land.

Í Brasil ger toymi okkara árinamiklar poddvarp**ss**endingar og andaktir, og tæna deyvasamfeløgum gjøgnum teknmál. Meðan *Kvinnur við Vón* í Paraguai er sermerkt av stórari tænastu í kvinnufongslum, hevur toymið í Uruguai eina stóra ávirkan við at senda *Kvinnur við Vón* sendingar til yvir 20 lond. Toymið í Domin**go**lýðveldinum hevur eina dygga tænastu á sosialum miðlum, eins og *Kvinnur við Vón* í Bonaire, ið nýtir sosialar miðlar og sendingar at eggja kvinnuhjørtu við skriftstøðum og vitnisburðum.

Sum trúgvandi kvinnur í øki okkara, stremba vit eftir at:

- Vísa kvinnum vegin at kenna Jesus, so tær kunnu verða umbroyttar og taka ímóti tí, Hann ynskir í lívi teirra.
- Stuðla kvinnum, at í Kristusi eru tær virdar, elskaðar og skaptar í bílæti Guds við einum serstøkum og virðismiklum endamáli.
- Minna tær á, at vit eru skapt av Gudi at siga frá náði Hansara og miskunn her á jørð, og útinna tey mál, Hann hevur givið okkum.

Við at boða evangeliið og ta vón, ið finst í Kristi Jesusi, kunnu vit eggja øllum kvinnum í øki okkara til at lata hjartað sítt upp fyri Honum og liva eitt lív í yvirflóð.

**”Høvuðsstuðulin í øllum kristiligum arbeiði er bøn” (Eeva Vähäsarja)**

## Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva

***KVINNUR VIÐ VÓN***

***twrwomenofhope.org***

**Fíggjarstuðul:**

**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**

**til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio). –**

**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –**

**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**